# Ein veitsla øll eiga ein part av

**Leygarkvøldið var grannaveitsla í skúlanum í Hoyvík fyri tey, sum búgva niðan fyri Vegin Langa. Hetta var eitt stak væleydnað tiltak, sum fyrireikarar og luttakarar eru ógvuliga glaðir fyri**

VEITSLA
*Ingrid Bjarnastein*



*Leygarkvøldið var skipað fyri grannaveitslu uppi í Hoyvíkar skúla. Heili 250 fólk vóru komin saman hetta kvøldið at hitta bæði kend og ókend fólk*

*Mynd: Finnur Justinussen*

Fyri fyrstu ferð í mong ár varð skipað fyri eini grannaveitslu í skúlanum í Hoyvík fyri tey, sum búgva niðanfyri Vegin Langa og tey, sum hoyra til fyrstu útstykkingingina har uppi. Heili 250 fólk vórðu savnað í skúlanum í Hoyvík leygarkvøldið, har tey komu saman við mat, dans, sang, gaman og álvara.

– Hetta var eitt stak væl eydnað tiltak, sum fólk vórðu ógvuliga glað fyri, sigur Katrin Dahl, sum var ein av fyrireikarunum.

Fólk í øllum aldri høvdu leitað sær til Hoyvíkar hetta kvøldið, har tað var møguleiki fyri at hitta fleiri, sum tú ikki hevði havt samand við í fleiri ár.

– Stemningurin var ótrúliga góður. Vit høvdu eitt felags borðhald, har øll, sum vóru við høvdu tikið ein rætt við. Sjálv havi eg ongantíð sæð nakað líknandi. Øll høvdu veruliga lagt sálina í tann rættin, sum tey tóku við, greiðir Katrin frá.

Lokalt skemt var á skránni, har tað var ein bólkur sum hevði gjørt undirhald, og eisini hetta riggaði stak væl. Sangur og talur sluppu sjálvandi eisini framat.

– Borðhaldið endaði við, at ein, sum eitur Annika Højgaard, hevði gjørt eitt show, og hon fekk alt í hopla.

## Dansur

Aftaná borðhaldið var skipað fyri føroyskum dansi, og aftaná varð spælt til dans.

– Vit høvdu stak góðarar kvøðarar, og so høvdu vit ein harmoniku spælarar og ein sangara at spæla til dans. Tað hóskaði seg stak væl, tí tað var ikki so hart, og tað bar framvegis til hjá fólki at sita og tosa og hugna sær.

– Hetta var eitt frálíkt høvi at koma nærri teimum, sum tú býrt so tætt upp á. Gamlir kennskapir vórðu uppfrískaðir og nýggir vórðu stovnaðir, so hetta var eitt ógvuliga gott sosialt tiltak, sigur Katrin Dahl.

Hvørt ein slík veitsla verður á skránni aftur ella ikki, veit Katrin ikki at siga enn.

– Vit eru í øllum førum fyribils komin væl og virðiliga frá hesi veitsluni. Sunnudagin vóru vit aftur í skúlanum og ruddaðu upp, og eisini tá var undirtøkan stak góð.

– Hetta var ein veitsla, sum vit øll eiga ein part av. Øll góvu sítt besta, og á henda hátt verður tað so ómakaleyst at skula skipa fyri eini veitslu, sigur Katrin Dahl at enda.

# Varpa ljós á tey ungu

**Um vikuskiftið verður ráðstevnan »Ung í Føroyum« sett. Hetta er ein stevna har ung millum 13 og 18 ár sleppa at sýna fram listarligu dygdir sínar**

UNG Í FØROYUM
*Ingrid Bjarnastein*

Annað árið á rað skipar Norðurlandahúsið fyri ráðstevnuni »Ung í Føroyum«. Ung millum 13 og 18 ár sleppa her at vísa sínar listarligu dygdir innan eitthvørt listarligt evni.

Tá freistin var úti í november mánað høvdu 110 ung teknað seg, men pláss er bert fyri 60 luttakarum.

Á stevnuni fara ung at sýna fram egin listarlig avrik bæði fyri hvørjum øðrum og fyri almenninginum.

Eisini verða listaverksmiðjur á skránni, sum umfata myndlist, tónleik, kór, skriving, video og dans.

Orsøkina til eina slíka stevnu siga fyrireikararnir vera, at hetta verður gjørt fyri at varpa ljós á ungdómsmentanina her á landi og skapa umstøður fyri teimum.

Tað eru Rakel Helmsdal, rithøvundur og Hedvig Westerlund, teaturpedagogur, sum eru leiðarar og fyriskiparar av stevnuni. Annlis Bjarkhamar setir stevnuna fríggjakvøldið, og hon er eisini verndari.

Seinnapartin sunnudagin fáa tey, ið hava hug, møguleika at síggja ymiskt framført í Norðurlandahúsinum.




*Annað árið á rað skipar Norðurlandahúsið fyri ráðstevnuni »Ung í Føroyum«. Her sleppa ung millum 13 og 18 ár at sýna fram listarligu dygdir sínar*



# Hava lagt ræðandi ætlan fyri fólkaskúlan

**Lærarafelagið hevur átalað, at umsitingin í Mentamálaráðnum av sínum eintingum hevur lagt eina fullfíggjaða ætlan um at avhenda fólkaskúlan til kommunurnar at umsita**

FÓLKASKÚLIN
*Áki Bertholdsen*



*– Tað má aldrin henda, at fólkaskúlin verður lagdur undir kommunurnar at umsita, sigur Føroya Lærarafelag og felagið hevur tí sett hælarnar. Myndin er av skúlabørnum á Húsum*

Tað má aldrin henda, at fólkaskúlin verður lagdur undir kommunurnar at umsita.

Elsa Birgitta P. Petersen, formaður í Føroya Lærarafelag, er púra avgjørd í síni meining um, hvør skal umsita fólkaskúlan í Føroyum.

Men hon sigur, at tað liggur nevniliga ein fullfíggjað ætlan í Mentamálaráðnum fyri, hvussu fólkaskúlin kann avhendast til kommunurnar at umsita.

– Hetta er ein ætlan, sum út í æsir greinar, hvussu skúlin fult og heilt kann verða lagdur út til kommunurnar at umsita.

Enntá skal samráðingarrætturin um lønirnar hjá lærarunum leggjast undir kommunurnar.

Elsa Birgitta P. Petersen sigur, at hon er greið yvir, at hetta er ikki ein ætlan, sum landsstýrismaðurin í skúlamálum, Annlis Bjarkhamar, hevur biðið um.

Hon sigur, at tvørturímóti er tað ein spurningur um hetta er eitt arbeiðið, sum nakar av landsstýrismonnunum hava biðið um.

– Spurningurin er um hetta ikki er ein ætlan, sum embætisverkið í Mentamálaráðnum hevur gjørt av sínum eintingum, uttan at nakar landsstýrismaður hevur biðið um tað.

Formaðurin í Lærarafelagnum sigur, at hon hevur átalað hjá Annlis Bjarkhamar, at ein slík ætlan yvirhøvur er gjørd, serliga, tá ið hugsað verður um at ongin politiskur flokkur hevur tað í sini stevnuskrá, at kommunurnar skulu umsita skúlan og tað er heldur ikki í samgonguskjalinum.

## Kommunur forða skúlunum at virka

Annars hevur tankin verður frammi av og á um, at tað er rættast, at kommunurnar skulu umsita skúlan.

– Men hendir tað, eru útlitini ræðandi og tað má undir ongum umstøðum henda. Tí hevur Lærarafelagið eisini langt síðani sett hælarnar í og tað fara vit at standa fast við, tí vit hava sett okkum fyri, at tað skal ikki henda.

Hon nevnir Viðareiðis Kommunu sum eitt talandi dømi.

– Har hendi tað, at Viðareiðis Skúli hevur ikki virkað til fulnar, tí kommunan hevur ikki viljað betalt 2.600 krónur fyri savnsrøktina.

– Hetta hevur onki við pening at gera. Tað er heldur ikki ein spurningur um prinsipp. Hetta er eitt dømi um hugburðin mótvegis skúlanum og lærarum yvirhøvur.

– Sostatt hevur tað borið til hjá Viðareiðis Kommuna at forða skúlanum í at virka eftir lógini og tað haldi eg er ógvuliga álvarsamt.

Formaðurin í Føroya Lærarafelag sigur, at tað skuldi helst verið so, at eitt barn kundi flutt úr einum skúla í annan, uttan at munur er á undirvísingini.

– Men verður skúlin lagdur undir kommunurnar at umsita, kann hetta ikki tryggjast at allir skúlar í landinum verða á sama støði. Tá fer tað at standa til eitthvørt tilvildarligt og skiftandi kommunustýri at gera av, hvussu skúlin verður raðfestir. Kommunustýri verða skift fjórðahvørt ár og tískil er tað so skjótt, at hugburðurin til skúlan kann broytast til tað betra – ella til tað verra.

– Dømi um Viðareiðis Kommunu fortelur okkum so mikið sum tað, at at kommunurnar mugu undir ongum umstøðum fáa ræðið á skúlanum, tí tá verður umsitingin av skúlanum púra tilvildarlig, alt eftir, hvør situr í kommununi.

– Tað er eisini stórur vandi fyri, at umisitingin av skúlanum verður tengdur at fíggjarligu støðuni hjá hvørjari einstakari kommunu. Fer tað at tátta í fíggjarliga hjá eini kommunu, vita vit at royndum, at skúlin og almannaverkið eru teir stovnarnir, sum verða teir fyrstu at merkja spariknívin.

Elsa Birgitta P. Petersen sigur, at tí hevur tað av størsta týdningi, at umsitingin av skúlanum verður verandi undir miðfyrisitingini.

– Annars verður vandin alt ov stórur fyri, at skúlarnir og tilboðini til næmingarnar verða ymisk, alt eftir, hvønn hugburð hvør einstøk kommuna, hevur, tí umframt fíggjarligar umstøður og hugburð, verður tað eisini altíð ymiskt, hvat tey ymsu kommunustýrini halda, hevur týdning fyri ein skúlan og um, hvussu skúlin skal vera.

– Tó skal viðmerkjast, at yvirhøvur raðfesta kommunurnar skúlarnar høgt, men tað eru meiri enn so undantøk og tað eru hesi undantøkini, vit ræðast.

– Eitt er at verða so nær brúkarunum sum gjørligt, men hetta er at fara ov nær og fyri at tryggja eina javntgóða undirvísing í øllum skúlum, er tað alneyðugt, at skúlin verður umsitin av miðfyrisitingini.

# Ongar ætlanir um at avhenda fólkaskúlan til kommunurnar

**Lærarafelagið hevur onki at stúra fyri, tí tað er ikki ein partur av virkisskránni hjá landsstýrismanninum í skúlamálum, at kommunurnar skulu umsita skúlarnar**

SKÚLAMÁL
*Áki Bertholdsen*



*Annlis Bjarkhamar kennir onki til nakra ætlan í Mentamálaráðnum um at leggja fólkaskúlan undir kommunurnar at umsita. Og tað er ikki ein partur av virkisskránni í hesum valskeiðnm, sigur hon*

– Eg kann siga heilt greitt, at tað tað eru ongar sum helst ætlanir um at leggja fólkaskúlan undir kommunurnar at umsita.

Annlis Bjarkhamar, landsstýrismaður í skúlamálum, sigur, at hon kennir onki til eina fullfíggjaða ætlan í Mentamálaráðnum um at avhenda fólkaskúlan til kommunurnar at umsita, soleiðis sum Lærarafelagið stúrir fyri í greinini omanfyri.

– Tað hevur á ongan hátt verið ein partur av virkisskránni fyri fólkaskúlan í hesum valskeiðnum, at kommunurnar skulu umsita skúlan, sigur Annlis Bjarkhamar.

Landsstýrismaðurin sigur, at hon veit heldur onki um, at mentamálaráðið hevur lagt eina ætlan fyri, hvussu fólkaskúlin kann verða lagdur undir kommunurnar at umsita.

– Tað er í hvussu so er ikki eitt arbeiðið, sum eg havi biðið umsitingina gera. Men er eitt slíkt arbeiðið gjørt fyri mína tíð í Landsstýrinum, er tað ikki nakað, eg havi ávirkan á. Men tað er í hvussu so er ikki ein ætlan, sum vit á nakran arbeiða eftir.

## Skúlin samsvara við tíðina

Annlis Bjarkhamar sigur, at hesi fýra árini hevur hon sett sær fyri at gera eina roynd at fáa innihaldið í fólkaskúlanum at samsvara við tíðini vit liva í og rundferðin, sum hon fór undir í gjár, er ein liður í hesum.

– Eg haldi, at vit skulu taka eitt stig í senn. Tá ið vit hava ment skúlan, so at hann virkar, sum vit vilja hava hann, kunnu vit altíð tosa um, hvat næsta stigið skal vera, tí vit skulu sjálvsagt altíð royna at menna skúlan. Men hvat tað næsta stigið verður, er ikki gott at vita nú.

Hon sigur, at av tí, at tað als ikki er ein partur av virkisskránni at leggja skúlan undir kommunurnar, hevur hon heldur ikki hugsað so gjølliga yvir tann spurningin.

– Rákið er tann vegin, at avgerðirnar skulu flytast so nær borgarunum sum gjørligt. Og tað haldi eg eisini er tann rætta gongdin.

– Men hinvegin hevur skúlin ein slíkan yvirskipaðan leiklut i samfelagnum, at tað er ein spurningur um tað ikki er rætt, at tað eru landsmyndugleikarnar, sum umsita og avgera innihaldið í skúlanum.

Hon sigur, at landsstýrið skal eisini varða seg fyri at kroysta nakað niður yvir høvdið á kommununum.

– Men verður politiska rákið einaferð tann vegin, at kommunurnar skulu umsita skúlan, eigur tað at vera gjørd eftir einum heilt greiðum leisti, har treytir verða settar til, hvussu innihaldið í skúlanum skal vera fyri at tryggjað, at skúlin lýkur tey krøv, sum lógin ásetir.

Hinvegin hugsi eg, at allar kommunur eru áhugaðar í hava ein so góðan skúla sum gjørligt, tí tað kemur teinum sanniliga til góðar. Men vit vita eisini, at tá ið peningur skal býtast, er mangan smábýtt, ikki tí, at illviljin er so stórur, men tí at ov lítið er at býta.

Lærarafelagið vísir til støðuna á Viðareiði, har savnsrøktin liggur lamin, tí at kommunan hevur ikki viljað goldið 2.600 krónur?

– Tað haldi eg ikki var av illvilja. Tað var meiri av prinsipiellum orsøkum, har Viðareiðis Kommuna ikki vildi átaka sær at betala ein part av læraralønunum, tí tað hava kommunur ongantíð gjørt. Tað er ein avgerð, sum vit eiga at virða. Men tað sigur okkum eisini so mikið sum tað, at skal tað einaferð í framtiðini koma upp á tal at leggja skúlarnar undir kommunurnar, mugu viðurskiftini vera púra greið, so at ongar misskiljingar og ongi ivamál taka seg upp um, hvør hevur ábyrgdina av hvørjum.

– Og tað er eisini eitt mál, sum krevur eina drúgva, politiska viðgerð, sigur Annlis Bjarkhamar.